# P/F FØROYA LÍVSTRYGGING

**Val av 5 umboðum at røkja áhugamál tryggingartakarans, meðan P/F Føroya Lívstrygging verður einskild.**

Vinnumálaráðið hevur heitt á P/F Føroya Lívstrygging um at skipa fyri einum vali, har 5 persónar, sum eru tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívstrygging, verða valdir at umboða tryggingartakararnar í sambandi við, at P/F Føroya Lívstrygging skal einskiljast.

Allir tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívstrygging hava valrætt og kunnu stilla upp sum umboð og vera stillarar.

**Hvør kann gerast umboð**
Øll, sum eru tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívstrygging, kunnu stilla upp til valið. Um tú ynskir at stilla upp sum umboðsfólk, skalt tú boða frá hesum skrivliga til P/F Føroya Lívstrygging, Postboks 206, 110 Tórshavn, í seinasta lagi tann 6. juni 2005.

Fyri at kunna stilla upp til valið, skalt tú hava undirskriftir frá 15 stillarum. Øll, sum eru tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívstrygging, kunnu verða stillarar. Ein persónur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og einans eitt valevni kann vera á hvørjum uppstillingarlista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk á P/F Føroya Lívstrygging og teirra hjúnafelagar ella sambúgvar, kunnu ikki veljast sum umboðsfólk. Eingin kann virka sum umboð, um tey eru sett í starv ella arbeiða hjá fyritøkum, sum eru kappingarneytar hjá P/F Føroya Lívstrygging.

Tá ið P/F Føroya Lívstrygging hevur fingið fráboðan frá tryggingartakarum, sum ynskja at stilla upp til val sum umboðsfólk, verður lýst í bløðunum, hvørji valevnini eru og tíðarfreistirnar fyri, nær atkvøðuseðil kann umbiðjast og nær hann skal vera skrivstovu felagsins í hendi.

Tórshavn, tann 23. mai 2005

**P/F FØROYA LÍVSTRYGGING**

# Vit sóknast eftir handverkara

At byrja beinanvegin. Skriva okkum nakrar reglur.

**Atlanticpane**

Tlf. 421405 · Fax 421602

# Arbeiðshandskar

*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

**ADC-Heilsølan spf**
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# Broyting í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21.mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 26. mai 2005 samtykti broyting í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at ein partur av D3 økinum, ætlað til stórar almennar stovnar fyri heilsurøkt o.t. við Álaker, verður broytt til B2 havnaøki.

Broytingin umfatar matr. nr. 970 a, Tórshavn.

Tilfar, sum lýsir broytingina liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 6. juni til og við 27. juni 2005, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 6. september 2005.



www.torshavn.fo

# Til barnagarðin á Gásamýri søkist

1 pedagogur í 35 tíma starv um vikuna at byrja 1. september 2005 og

1 pedagogur fyri pedagog í farloyvi frá 8. august 2005 til 1. februar 2006 í 35 tíma starv um vikuna.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 443 325 ella 74 125.

Skrivlig umsókn við avitum av møguligum prógvum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi **mánadagin 20. juni 2005.**

Um ongin skikkaður umsøkjari er, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Leirvíkar Kommuna**
Postrúm 42
520 Leirvík

# Bókasavnið

Er stongt vegna feriu frá 13. juni til 11. juli.

**Vágs Bókasavn**
tlf. 373991

VR BILAR

# Lærupláss

VR-Bilar søkir eftir lærlingi til eykalutagoymsluna at byrja skjótast til ber.

Umsøkjarar skulu hava lokið FHS-prógv. Í lærutíðini skal lærlingurin á danskan skúla nakrar viku um árið.

Lærutíðin er 3 ár, og lærlingurin fær løn í allari lærutíðini eftir galdandi sáttmála.

Allar umsóknir við prógvum skulu sendast til:
**VR-Bilar Sp/f**
Hoyvíksvegur 61
Postsmoga 3130
FO-110 Tórshavn

Meira fæst at vita um læruplássið við at ringja til Agatu Sørensen á telefon 322110.

**Um VR-Bilar:**
VR-Bilar er ein bilafyritøka í støðugari menning, sum selur persónbilar av merkinum Volvo og Renault, umframt Volvo lastbilar og bussar.

Afturat bilasøluni eru knýtt 2 verkstøð. Eitt persónbila- og eitt lastbilaverkstað. Til at veita hesum tænastu er ein eykalutagoymsla.

Á VR-Bilum arbeiða í løtuni 18 fólk. Harav eru 12 mekanikarar og 2 fólk eru á eykalutagoymsluni.

# Felagsskúlin á Oyrarbakka

Søkt verður eftir lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2005/06.

1 starv við fullum tímatali fyri lærara í farloyvi.
Lærugreinir: ítróttur (dreingir), støddfrøði, alis-/-evnafrøði og landalæra.
Lærari, sum kann undirvísa í dreingjaítrótti, hevur fyrimun.

Uml. 0,6 starv vegna avlopstímar.
Lærugreinir: føroyskt og enskt.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast frá skúlastjóranum á tlf. 422084 ella 423153.

Umsóknir saman við ljósriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera Felagsskúlanum í hendi í seinasta lagi 9. juni 2005.

**Skúlastýrið fyri Felagsskúlin á Oyrarbakka**
v/ Randi Djurhuus
FO-430 Hvalvík

# Eysturoyingar

## Eysturoyar Teoriskúli

**Nýtt teoriskeið byrjar týsdagin 7. juni kl. 19.00**

**Tilmelding hjá:**
**Hugo Kristiansen, tel 225225**

Sosialurin 341800